FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

**Argir**, 17. november 2015

# Skattalætti til lág- og miðalinntøkur í 2016

## Inngangur

Ætlanin við uppritinum er at greiða frá skattalættanum, sum samgongan ætlar at fremja í 2016. Fyrst verður sagt frá, hvørjar broytingar ætlanin er at fremja í lands- og kommunuskattinum. Síðani verður greitt frá, hvussu skattalættin ávirkar ymisku inntøkubólkarnar. At enda verður sagt frá, hvussu skattalættin verður fíggjaður.

## Broytingar í landsskattinum

Núverandi skattastigi er soleiðis, at ongin landsskattur verður rindaður av fyrstu 65 tús. kr. í skattskyldugari inntøku. Av allari inntøku omanfyri 65 tús. kr. verður rindað 20% í landsskatti. Av inntøku omanfyri 500 tús. kr. verður umframt tey 20% rindað 5% eyka. Fyri tann partin av inntøkuni, ið fer upp um 800 tús. kr., verða umframt tey 25% løgd eyka 5% afturat, soleiðis at skatturin av inntøku omanfyri 800 tús. kr. gerst 30%.

| Landsskattastigi 2015 | | | |
|---|---|---|---|
| | ***Botnfrádráttur (kr.)*** | ***Skattur (%)*** | ***Íalt (%)*** |
| Landsskattur 1 | 65.000 | 20% | 20% |
| Landsskattur 2 | 500.000 | 5% | 25% |
| Landsskattur 3 | 800.000 | 5% | 30% |

Skotið verður upp, at landsskattastigin verður soleiðis frá 2016:

| Landsskattastigi 2016 | | | |
|---|---|---|---|
| | ***Botnfrádráttur (kr.)*** | ***Skattur (%)*** | ***Íalt (%)*** |
| Landsskattur 1 | 45.000 | 15% | 15% |
| Landsskattur 2 | 220.000 | 4% | 19% |
| Landsskattur 3 | 300.000 | 4% | 23% |
| Landsskattur 4 | 370.000 | 2% | 25% |
| Landsskattur 5 | 800.000 | 5% | 30% |

Sum víst, verður niðasti botnfrádráttur lækkaður niður í 45 tús. kr., samstundis sum skatturin á lægsta stigi lækkar niður í 15%. Nýggi skattastigin hevur 5 stig, sum eru 2 fleiri sammett við stigan, sum í dag verður nýttur.

Kvíggjartún 1 • Box 2039 • FO-165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • ✉ fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

**Broytingar í kommunuskattinum**

Botnfrádrátturin í kommunuskattinum er 30 tús. kr. Kommunuskattaprosentini eru rættiliga ymisk. Lægsta skattaprosentið er 16% og hægsta skattaprosentið er 23,5%. Miðal skattaprosentið hjá kommununum í 2015 er 21,16%.

Skattaprosentini hjá kommununum fyri 2016 eru ikki endaliga ásett enn. Tí ber ikki til at siga, hvat miðal kommunuskattaprosentið verður í 2016.

| Kommunuskattur 2015 | | | |
|---|---|---|---|
| ***Botnfrádráttur*** | ***Lægsta*** | ***Miðal*** | ***Hægsta*** |
| 30.000 | 16% | 21,16% | 23,50% |

Mælt verður til, at botnfrádrátturin í kommunuskattinum verður hækkaður upp í 45 tús. kr. í 2016. Hetta, saman við broytingini í landsskattinum, hevur við sær, at botnfrádrátturin í kommunuskattinum og botnfrádrátturin í landsskattinum gerast eins. Rindaður verður tískil ikki inntøkuskattur av fyrstu 45 tús. kr. frameftir.

**Marginalskattur**

Broytingarnar hava við sær, at marginalskatturin lækkar á lægru inntøkurnar. Tá farið verður upp um 300 tús. kr., gerst marginalskatturin hægri enn hann var frammanundan, men er síðani hin sami fyri inntøkur omanfyri 500 tús. kr.




**Viðm:** Roknað verður við miðal kommunuskattaprosentinum í 2015 á 21,16%

**Miðalskattur**
Broytingarnar hava við sær, at inntøkuskatturin verður meira stigvísur (progressivur) enn frammanundan. Hetta er tí, at láginntøkurnar – serliga tey við ársinntøku millum 175 tús. kr. og 250 tús. kr. – fáa mesta lættan í prosentum.




**Viðm:** Roknað verður við miðal kommunuskattaprosentinum í 2015 á 21,16%

**Skattalætti í kr.**
Broytingarnar í lands- og kommunuskattinum hava samanlagt við sær, at serliga lág- og miðalinntøkurnar fáa ein munandi skattalætta.

Skattgjaldarar við inntøku á 300 tús. kr. – hetta verður vanliga roknað sum miðalinntøkan í Føroyum – fáa mesta lættan í krónum, góðar 700 kr. um mánaðin.  Allar inntøkur millum 190 tús. kr. og 380 tús. kr. fáa ein lætta á omanfyri 500 kr. um mánaðin.

Fyri inntøkur á 500 tús. kr. og meira verður ávirkanin lítil og ongin.




**Viðm:** Roknað verður við miðalkommunuskattaprosentinum í 2015 á 21,16%

**Kostnaður**

Talan er um ein stóran skattalætta. Samlaði kostnaðurin verður umleið 151 mió. kr. árliga. Hetta samsvarar við umleið 1% av føroysku bruttotjóðarúrtøkuni. Av teimum 151 mió. kr. stava 111 mió. kr. frá lækking í kommunuskattinum, meðan 40 mió. kr. stava frá lækking í landsskattinum.

Gjørt verður tó vart við, at tað ikki enn er endaliga staðfest, hvat skattalættin kemur at kosta kommununum. Hetta veldst um, hvat endaligu skattaprosentini verða í 2016.

| **Kostnaður av skattalættanum í 2016 (mió. kr.)** | |
|---|---|
| Landið | 40 |
| Kommunur | 111 |
| **Tilsamans** | **151** |

**Fígging**
Skattalættin verður í høvuðsheitum fíggjaður við, at tey gjøldini, sum alivinnan og fiskivinnan rinda fyri síni rættindi, verða broytt og dagførd. Roknað verður við, at umlegging og dagføring av loyvisgjaldinum á alivinnu fer at hava við sær eina meirinntøku á 68 mió. kr. í 2016. Somuleiðis verður roknað við meirinntøku á 67 mió. kr. í sambandi við, at tilfeingisgjald verður lagt á fleiri fiskasløg, at verandi tilfeingisgjøld verða dagførd, og frá uppboðsølu av fiskatilfeingi.

Landsstýrið roknar við, at skattalættin til lág- og miðallønt fer at hava við sær, at meira peningur kemur í umferð í samfelagnum, millum annað tí at partur av skattalættanum fer út aftur sum nýtsla í samfelagnum. Skattalættin verður latin lág- og miðalløntum, sum hava avmarkaða fíggjarorku og avmarkaðan tiltøkupening. Tiltøkupeningurin hjá hesum húsarhaldum hækkar munandi, og roknað verður við, at partur av lættanum fer út aftur sum nýtsla í samfelagnum. Ávirkanin á landskassan verður varisliga mett til 16 mió. kr. í øktum landsskatti og meirvirðisgjaldi.

| **Fígging av skattalætta í 2016 (mió. kr.)** | |
|---|---|
| Avgjøld á fiskatilfeingi og uppboðsøla | 67 |
| Umlegging og dagføring av loyvisgjaldi á alivinnu | 68 |
| Avleiddar inntøkur hjá landinum av skattalættanum | 16 |
| **Tilsamans** | **151** |

**Afturbering til kommunur**
Kommunurnar koma at bera mesta partin av skattalættanum, íalt 111 mió. kr. Henda upphæddin verður tó afturborin til kommunurnar.

Umleið 49 mió. kr. verða afturbornar við, at kommunurnar frameftir fáa 45% av loyvisgjaldinum, ið alivinnan rindar. Umleið 45 mió. kr. verða afturbornar við, at kommunurnar frameftir fara at fáa alt tað endurrindað, sum tær rinda í meirvirðisgjaldi – sum er, fáa kommunurnar 75% endurrindað. Harumframt fara kommunurnar at fáa øktar skattainntøkur í sambandi við, at samgongan ætlar at hækka bæði viðbótina í fólkapensjónini og útgjaldið úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum í 2016.

| **Afturbering til kommunurnar í 2016 vegna hækking í botnfrádráttinum (mió. kr.)** | |
|---|---|
| Loyvisgjald á alivinnu (45%) | 49 |
| Fulla afturbering av meirvirðisgjaldi | 45 |
| Kommunuskattur vegna hækking av viðbót | 2 |
| Kommunuskattur vegna eyka hækking av AMEG | 15 |
| **Tilsamans (mió. kr.)** | **111** |